

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*

# Oyrar bygd á Mørkini

Á Sundalagsstevnuni nú um vikuskiftið er ein serliga áhugaverd framsýning. Hon er á ellisheiminum Mørkini í Streymnesi og kallast »Modell av Oyrar bygd í 1920-unum.«

Maðurin aftan fyri hesa framsýning er tann 90 ára gamli Esmar Dahl av Oyri. Umframt at vera ein fróðarmaður, sum minnist ótrúliga væl til, so hevur hann sera góðar hendur.

Eitt er, at Esmar hevur gjørt eitt modell av Oyrar bygd. Tað er í sær sjálvum eitt avrik. Men hann hevur eisini gjørt modell av húsunum í bygdini. Tað er ikki nóg mikið við tí. Hann hevur eisini gjørt modell av innrættingini av húsunum. Hann hevur gjørt hvørja hædd fyri seg, so tað sæst nágreiniliga, hvussu húsini vóru innrættað frá kjallara, miðhædd og til loft.

Í kjallaranum síggjast neytini á básunum, og í miðhæddini sæst enntá náttpotturin undir songini.

Allar hæddirnar kunnu so setast saman, og tá sæst, hvussu húsini sóu út uttanifrá. Sum ein av teimum, sum havi vitjað Esmar kann sigast, at hetta er snøgt sagt eitt ótrúligt avrik, sum ein bert kann fáa fatan av við at síggja tað. Alt hetta hevur Esmar gjørt, eftir at hann er blivin 80 ár. Tað er fyri neyðini, at tað nú verður skipað fyri hesi framsýning, sum øll eiga at síggja.

Í sama viðfangi skal ynskjast Esmari tillukku við teimum 90 árunum, sum hann fylti nú um dagarnar.

Framsýningin er opin leygardagin og sunnudagin frá kl. 16. til 20.

**ó.**



*Modell av Oyrar bygd við húsum og neystum*



*Esmar Dahl og langabbasonurin Áki*



*Miðhæddin í einum av húsunum við fullari innrætting*

# Grundleggjandi leiðaraskeið



Tilsamans 12 næmingar hava staðið royndina í grundleggjandi leiðslu, sum Skeiðsdepilin skipar fyri. Skeiðið, sum varð hildið á Hotel Hafnia, byrjaði í mars í ár, og fríggjadagin 11. juni fáa næmingarnir prógv. Skeiðsdepilin er eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla Tórshavn.

Tey, sum hava staðið royndina, eru: **Fremra rað f.v.:** Mai-Britt Holm Andersen (Skúlin við Áir), Sunneva Jacobsen (LÍV), Annika Thomsen (EIK), Joan Sivertsen (Klaksvíkar Sjúkrahús), Jona Dam (Røktarheimið á Mørkini, Streymnes) og Marin Vang, skeiðleiðari. **Aftara rað f.v.:** Atli Poulsen, Bjarni Olsen, Terji Poulsen, Steinfinn V. Jacobsen, Eirikur Ólason Simonsen, Helgi Mortensen og Dávid Isfeldt, sum allir starvast á Tekniska Skúla Tórshavn.

# *So er sagt*

Lag: Eg livi og veit

*Vár Drottur hvørs sæti á Himmlinum er*
*har skoðar øll veraldar ríki*
*Hans veldi og vitan um rúmdina fer*
*væl røkkur hvørt kykt hvørja blómu í verð.*
*Ei finnst her í heimi hans líki.*

*Tann verkevnismáttur av hansara hond*
*er allra manns upphav á foldum*
*tað yðandi lív fyllir stórhøv og lond,*
*ùr ísbláa himni til fjarðastu strond*
*til ótaldar verur í moldum.*

*Til verju og vernd er Guðs velduga hond*
*og máttmiklu einglanna skarðar*
*um leiðin er greið,ella løtan er vond*
*so er hansar eyga og eingil í nánd,*
*tá tung kennast spor millum varðar.*

*Hann byrjan og enda í hond hevur svá*
*vit gætur tí øll skuldu givið -*
*várt dagatal talt er hann sigur so frá*
*væl áðrenn várt eyga fekk ljósið at sjá*
*sum upphav og kraft var til lívið.*

*Tó skugga kann brátt yvir lívsdagin her*
*tá maður bert jarðargóðs toknast,*
*tann hávi og møði øll ogn honum ber*
*og marglætisgripir hann savnaði her,*
*men valla veit hvørjun tað ognast.*

*Alt hold er sum gras íð blómar tað stund*
*á summri og sólføgrum løtum.*
*Tó kennist brátt heysti, tað kølnar um grund*
*og liljurnar føgru tær følna í lund,*
*og gult bognar grasið á fløtum.*

*Hvat gagnar so manni øll ogn hans og fæ*
*hann eftir seg legði á foldum,*
*men ikki gav ans um hin æviga stað*
*sum honum var givin til bústað tann dag*
*hann sjálvur lá gloymdur í moldum*

*Lat moldina eiga tað hennara er*
*sum móðir til seinast øll fevnir,*
*Tó andin er búgvin til drúgvari ferð*
*tá deyðin ei hond fekk á sál vára her,*
*sum fræls móti stjørnunum stevnir.*

**Viggo Johannesen**

## Prógv



Tann 9. desember 2009 fekk Hans Petur Hansen prógv sum cand.scient.oecon (M.Sc. Mathematics-Economics) á Københavns Universitet. Hann starvast sum Risk Analyst í Codan Forsikring.